Tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 96 Mikudagur 22. mai 1996 | 70. árgangur | Krónur 7,00



## Farið verður til verka í Lopra fyrsta dagin

baksíðan

### Landsverkfrøðingurin um bygnaðarbroytingarnar:

# Aðalstjórarnir mugu hava ótrúligt sjálvsálit



*– Tann sum ætlar at søkja eitt av teimum seks aðalstjórastørvunum, skal duga alt, og tað er ómøguligt at samanfata í einum persóni, sigur Henning Jacobsen, sum ikki hevur nógv góð orð at geva uppskotinum*

síða 8-9



### Suni á Dalbø, samfelagsfrøðingur um komandi oljuvinnuna:

# Vit mugu arbeiða saman og fyrireika okkum væl

*Miðvingurin Súni á Dalbo hevur júst lokið prógv sum samfelagsfrøðingur á Aalborg Universitet. Hann skrivaði høvuðsupgávu um komandi føroysku oljuvinnuna. Hann ávarar móti sjálvdrátti innan oljuvinnuna. Hann sigur, at við samstarvi er einki til hindurs fyri, at Føroyar og ein oljuvinna kunnu virka saman*

síða 8-9





*Suni á Dalbø, samfelagsfrøðingur: -Vit mugu fyrireika okkum ómetaliga væl til eina komandi oljuvinnu. Mynd Jan*

*Suni á Dalbø, samfelagsfrøðingur um eina komandi oljuvinnu:*

# Smá stig á røttu leið tað skilabesta

*Hann ávarar móti sjálvdrátti í eini komandi oljuvinnu. Skulu føroyingar klára at taka ímóti teirri stóru avbjóðing, sum ein oljuvinna er, mugu vit arbeiða saman og fyrireika okkum væl. Eydnast hetta er einki til hindurs fyri, at Føroyar og oljuvinnan kunnu virka saman. Hetta heldur Suni á Dalbø, sum júst hevur lokið prógv sum samfelagsfrøðingur við endaligu uppgávu síni um Føroyar og oljuna.*

Jan Müller

Tað gerst alt meira vanligt, at føroyingar, sum útbúgva seg í útlandinum, velja at viðgera eina komandi oljuvinnu í endaligu høvuðsuppgávuni.

Herfyri tók miðvingurin Suni á Dalbø endaligt prógv í samfelagsfrøði við serligum atliti til altjóða viðurskifti - "cand. scient. soc." - við lærda háskúlan í Aalborg. Sum partur av útbúgvingini arbeiddi hann í eina tíð á ST-høvuðsborgini í New York.

Undir tí áhugaverda heitinum "Færøerne og Olieindustrien - et umage par" hevur hann gjørt eina høvuðsuppgávu, sum fyllir góðar 100 síður.

Sosialurin hevur tosað við Suna á Dalbø, nú hann er komin heimaftur á klettarnar og roynir at finna sær arbeiði her.




### Nógv tosa um oljuna

Hví valdi hann tá at gera høvuðsuppgávuna um Føroyar og eina komandi oljuvinnu?

Suni sigur, at hann øll tey fyrstu árini arbeiddi við uppgávum, sum einki høvdu við Føroyar at gera. Hetta fyri at kunna kenna sítt fak betur.

Men tað hevur alla tíðina verið ætlanin at enda við eini uppgávu um føroysk viðurskifti, og í henni brúka ta fakligu vitanina, sum er fingin øll árini.

Orsøkin til at hann valdi oljuna var tann, at hetta er eitt mál, sum er alsamt meira og meira frammi í fjølmiðlunum. Ein kundi merkja, at fleiri fólk sóu oljuna sum nakað positivt, nakað, sum kundi vera við til at menna og betra um støðuna í samfelagnum, sigur hann.

-Eg helt, oljuna kunna gerast eitt so týðandi mál fyri Føroyar, og tá hugsað varð um, hvussu lítið varð kjakast um evnið við undantaki av tí, sum er borið fram í avísum fjølmiðlum, valdi eg júst hetta evnið. Kanska tað kundi vera við til at fáa gongd á orðaskiftið.

### Mugu ansa okkum

Og nú hann hevur brúkt drúgva tíð uppá hesa spennandi og sera forvitnisligu uppgávuna, spurdu vit, hvørja niðurstøðu hann er komin til?

Hana kundi eg longu havt skrivað niður áðrenn, soleiðis at skilja, at tað skal ikki stórt hugflog og vit til fyri at sigga, at vit mugu ansa eftir ikki at blása eina nýggja ballón upp, sum lætt kann bresta.

Tá vit hava sæð, hvussu fiskivinnan hevur klárað at yvirupphita samfelagið, er greitt, at tað skal ikki nógv til, fyrr enn ein oljuvinna kann gera hetta sama.

Suni á Dalbø heldur sjálvur, at smá stig á røttu leið er besta gongdin fyri okkum føroyingar í eini komandi oljuvinnu.

Hann heldur, at vit fyribils bara eiga at gera íløgur, har íløgan hevur eitt varandi virði - sjálvt um eksternir faktorar velja og vilja nakað annað.

Tær íløgurnar, sum skulu gerast í Føroyum, skulu í so stóran mun sum gjørligt kunna brúkast til nakað, uttan mun til um oljufelagini bráddliga fara at siga, at her var eingin olja ella, at tað tekur 20 ár ístaðin fyri 10 at koma í gongd.

Tá má ikki koma hartil, at eitt oljufelag knappliga kann loyva sær at siga, at nú flytur tað alt sítt virksemi til annað pláss, og at vit tá standa eftir við einum útbygdum infrastrukturi, rørleiðingum o.s.fr., sum einki virði hevur í sær sjálvum uttan so, at oljufeløgini eru við.

### Eiga at fara í gongd

Suni á Dalbø heldur, at vit eiga at meta um allar vandar og eisini hetta, at vit kunnu verða rakt av eini umfevnandi oljuvanlukku, sum kann leggja alt lamið.

Men hann heldur ikki, at slíkt eigur at forða fyri, at vit fara í gongd.

Hvat viðvíkur reglum og treytum fyri eina komandi oljuvinnu heldur Suni á Dalbø, at tá talan er um skattaskipanir og avgjøld, eiga vit ikki at læsa hesi føst frá byrjan.

Nógv meira umráðandi fyri okkum mótvegis oljufeløgunum er at kunna gera sáttmálar við feløgini um útbúgvingar og arbeiðspláss yvir eitt longri tíðarskeið.

Í uppgávuni umrøður Suni á Dalbø eisini sera torføra leiklutin hjá eini lítlari tjóð sum tí føroysku at skula samráðast við tey stóru transnationalu oljufeløgini.

### Mugu gera okkum út til at vera ein góður samráðingarpartur

Hvussu heldur hann tá, at vit skulu fyrireika okkum uppá at kunna vera ein góður samráðingarpartur - hava vit í veruleikanum nakran møguleika at vera ein nóg góður mótpartur og harvið tryggja, at vit ikki verða snýtt ella yvirrend av teimum stóru oljugigantunum?

Eg meini ikki, at støddin ger hetta ómøguligt, men nettup búskaparliga og fyri tað geografiska støðið okkara ger, at júst tann spurningurin verður so týdningarmikil fyri okkum í mun til onnur lond, har talan er um meira "natúrligar" samarbeiðspartnarar, tá hugsað verður um støddina á oljufeløgum samanhildið við t.d. bruttotjóðarúrtøkuna hjá einum landi.

Í Føroyum er støddar- og ressursmunurin øgiligur. Tí skal nettup tað at fyrireika seg so væl sum tilber takast í størsta álvara.

Suni á Dalbø ávarar annars móti teimum negativu

➤➤




*Vit mugu gera okkum út til at kunna vera ein góður samráðingarpartur, tá týðandi avgerðir skulu takast saman við oljugigantunum, heldur Suni á Dalbø. Tekningina hevur Óli Petersen gjørt og er frá baksíðuni í Sosialinum*

*Framhald av síðu 9*

kann oljuvinnan enta disiplinera okkum til veruleikan ár 2000

**Mugu ansa eftir**

Hóast hann ikki heldur, at vit skulu upptala oljufelögini sum nakran tiggjinda, so eiga vit at ansa eftir ikki at verða koyrd um koll av teimum.

-Teirra uppgáva er at fáa sum mest burturúr. Tess minni vit fáa burtur úr einum samarbeiði, tess meira fáa oljufelögini. Tey sita ikki við leiklutinum sum nakrir smáir pedagogar, ið skulu tryggja, at ein Tummas í Kvívík og ein Hanus í Klaksvík fáa nakað ella nokk av kökuni.

Oljufelögini eru at sammeta við sera professionell samráðingarfólk, sum eru von við at møta sínum javnlíkum. Og møta tey einum mótparti, sum ikki kennir sína vitjunartíð og megnar uppgávuna at fáa sum mest í sín part, tá verður hesin við svidusoð. Tí er tað so ómetaliga umráðandi, at vit føroyingar gerast meira professionell, tá vit skulu til at samráðast um býti av oljuinntøkunum.

**Bíðar við spenningi eftir oljufrágreiðing**

Suni á Dalbø er millum teirra, sum spentur bíðar eftir at síggja komandi frágreiðingina frá Oljuráðleggingarnevndini.

Tá fyrru frágreiðingina hevur hann lisið á tamb. Stóri vandin við henni var og er, heldur hann, at hon bara reksar upp møguleikar og hvussu tað so kann fara at gangast.

Eg meini, at vit áttu eisini at fingið eitt útkast frá nevndini um, hvussu hon heldur tað eigur at verða gjørt.

Nevndin eigur eftir míni meting í sínum tilmæli eisini at prioritera møguleikarnar.

Eg loyvi mær annars at ivast í, um tað fer at eydnast nevndini at loysa upp fyri einum breiðum kjaki men vit kunnu so bert vóna tað og síggja fram til eitt gott og breitt orðaskifti um hetta so stóra og týdandi mál.


